# ARBEIÐSEFTIRLITIÐ

*Administration of Occupational Safety and Health*

Fútalág 1B ✪ P.O.Box 1134 ✪ FO-110 Tórshavn ✪ Faroe Islands

Tlf. +298 317811 ✪ Fax +298 314489 ✪ E-mail: info@arbeidseftirlit.fo


***Skrásetingar nr.:***

**L-A013-1**

# Leiðbeining
# um
# AIDS og fyribyrging móti HIV-smittu

## *1. Inngangur*.

Sambært lógtingslóg frá 24 mai 1974 um arbeiðaravernd, grein 3, hevur arbeiðsgevarin ábyrgdina av, at arbeiðið verður skipað og lagt til rættis soleiðis, at vandi ikki er fyri trygd og heilsu.

Har vandi kann verða fyri at fáa AIDS-virus (HIV), skal arbeiðsgevarin syrgja fyri trygdartiltøkum, sum verja einstaka arbeiðaran.

Umframt hetta skal arbeiðsgevarin kunna arbeiðsfólkið um óhapp- og heilsuvandar, sum kunnu standast av arbeiði, eins og arbeiðsgevarin skal syrgja fyri neyðugari upplæring og venjing soleiðis, at arbeiðið kann gerast á minst vandamikla hátt.

Henda leiðbeining snýr seg um sjúkuna AIDS og vandan fyri smittu við AIDS í arbeiðsumhvørvinum, eins og reglur fyri, hvussu áðurnevndu ávísingar kunnu forða fyri at vandi kann standast á arbeiðsplássinum.

Arbeiðseftirlitið krevur, at arbeiðið verður framt eftir reglum og leiðbeiningum stovnsins, ella á annan hátt, sum er eins tryggur.

Samanumtikið kann sigast, at vandin fyri sjúkuni og tørvur á at fremja serligar trygdarskipanir er ógvuliga lítil.

Hinvegin er avleiðingin - um ein verður HIV-smittaður, ógvuliga álvarsom. Tørvur er samstundis á at verja fólk móti ótryggleika og bangilsi um AIDS. Tað kann bert gerast við upplýsing.
Hetta er grundarlagið fyri, at Arbeiðseftirlitið hevur gjørt hesa leiðbeining.

## *2. Kunning*.

AIDS stendur fyri Acquired Immuno Deficiency Syndrome. HIV er tað virus, sum hjá einum parti av teimum smittaðu, elvir til eyðkvæmi (AIDS). HIV leggur serliga eftir hvítu blóðkroppunum, sum vanliga verja likamið, og sostatt verður verjan brotin.

***Lógarheimild:***

Løgtingslóg nr. 58 um arbeiðaravernd frá 24. mai 1974 við seinni broytingum.

| | |
|---|---|
| ***Útgivið fyrstu ferð:*** **13. apríl 1989** | ***Seinastu broytingar:*** |

*Sjúkumyndin av fólki, ið fáa HIV-smittu er henda:*

Teir fyrstu mánaðarnar eftir at persónur hevur fingið smittuna, kunnu sjúkueyðkennini vera, fepur, svullir í eitlunum ella útbrot á holdinum, men umleið ein helvt av teimum smittaðu, hava eingi sjúkutekin. ì fáum førum gera HIV-smittað andevni móti HIV áðrenn tríggir mánaðar eru farnir. Tað kann ávísast við eini blóðroynd.

Er persónur HIV-smittaður, merkir hetta, at hann er smittuberari fyri lívið, og at andevnið ikki verjir móti virus.

Tá eitt tíðarskeið er liðið (àr), gevur sjúkan seg til kennis sum AIDS, hjá umleið einum triðingi av teimum smittaðu og umleið ein triðingur fáa onnur álvarslig sjúkutekin.

Viðvíkjandi AIDS er sjúkumyndin ógvuliga fjølltáttað, og tað kemst av at verjuskipanin ikki virkar. Talan kann vera um fleiri sløg av bruna, og við hvørt eisini krabbavøkstur. Enn doyggja nærum allir AIDS-sjúklingar eftir fáum árum.

Enn fæst ikki heilsubót móti AIDS, men granskarar arbeiða við at finna nýggjan heilivág. Eitt av hesum evnum - AZT- hevur havt góða ávirkan og sigst hava longt lívið hjá AIDS-sjúklingum. AZT -viðgerð av teimum, ið nýliga eru vorðin HIV-smittað, gevur álvarslig hjáárin og er enn á royndarstigi.

Enn er ikki møguligt at geva fyribyrgjandi koppseting, og væntandi ganga fleiri ár, áðrenn koppseting ella verulig viðgerð kann gevast.

I Føroyum er AIDS ikki komið higartil, men eini seks fólk hava fingið HIV-smittu. (1989)

Í Danmark kom AIDS-sjúkan fyrstu ferð til sjóndar í 1981, og talið av sjúklingum er støðugt vaksið.

30. april 1988 hevði Statens Seruminstitut skrásett 275 AIDS-sjúklingar. Umleið 1500 fólk høvdu við blóðroynd fingið staðfest HIV-smittu í Danmark. Veruligu tølini eru hægri og mett verður í løtuni (1989), at eini 5.000 - 10.000 fólk eru HIV-smittað.

WHO altjóða heilsustovnurin, hevur kring heimin skrásett eini 95.000 AIDS-tilburðir. Umframt hetta verður hildið, at eini 5-10 mió. menniskju eru HIV-smittað.

Fyri at fáa HIV-smittu krevst, at smittuberandi tilfar kemur inn í likamið hjá móttakaranum, t.d. prik við dálkaðari holnál ella, tá smittað blóð kemur í samband við slímhinnur ella skadda húð.

Við vissu vita vit bert um smittu, tá talan hevur verið um kynsligt samband, yvirføring av smittaðum blóði (t.d. við blóðgávu ella prik við nál, ið er dálkað) og fostursmittu í móðurlívi.

Sammett við aðrar sjúkur, ið smitta á sama hátt sum AIDS, eitt nú hepatitis B (livurbruni), er HIV ikki serliga smittuberandi, av fleiri grundum:
- virusmongdin er ikki stór í tí sjúka
- virus er ikki serliga lívført uttanfyri likamið
- virus er ikki serliga virulent (t.v.s. tað skulu stórar virusmongdir til áðrenn ein verður smittaður.

HIV smittar ikki gjøgnum luftina og fer ikki gjøgnum heila húð. HIV smittar sostatt ikki við vanligum sambandi millum fólk, á arbeiðsplássinum ella í heiminum. Tað smittar heldur ikki

gjøgnum mat, gaflar og knívar, baðivatn, toilett, handklæði ella líknandi.

### *3. Smittuvandi í arbeiðsumhvørvinum*.

Starvsfólk, sum í dagliga virki sínum ikki koma í samband við blóð, vevnað ella likamsvætu, og sum bert hava vanligt samband við onnur fólk, eru ikki í vanda fyri at fáa HIV-smittu.

Hinvegin kunnu standast vandamiklar støður, har fólk kunnu hugsast at fáa HIV-smittu, - eitt nú av pirk við blóðdálkaðum holnálum og knívum, og í ávísum førum, tá fyrstuhjálp verður givin.

At enda kann tað verða ein teoretiskur møguleiki at fáa smittuna orsakað av biti ella klóri. Hetta er kortini ongantíð hent í samband við arbeiði.

*Dømi um yrkisbólkar uttanfyri heilsuverkið, hvørs yrki kann føra við sær vanda fyri smittu:*

- Renovatiónsarbeiðarar, kloakarbeiðarar, reingeringsfólk sum beina burtur holnálir og aðrir hvassir lutir.
- Løgreglufólk og starvsfólk í fangahúsi, sum kunnu koma út fyri valdsgerðum og hóttanum. Slíkar støður kunnu eisini standast, tá lógarbrótarar verða kroppsrannsóknaðir fyri holnálum og øðrum hvassum lutum.
- Bjargingarfólk - í samband við fyrstuhjálp, har talan er um bløðing og møguleiki er fyri priki- ella skeraóhappi.
- Akupunktørar, tatovørar, fótterapeutar, orsakað av spískum ella hvassum amboðum.

Frásagnir um yrkiselvda HIV-smittu eru bert úr heilsuverkinum. À alheimsstigi vita tey bert um 20 fólk, sum hava fingið HIV-smittu, vegna arbeiði (1989). Flestu teirra eru smittaði av óhappi við dálkaðum holnálum ella øðrum hvassum lutum. Hin parturin er vorðin smittaður, tá HIV-smittað blóð er komið á skadda húð ella slímhinnur, ella eftir í drúgt tíðarskeið at hava havt samband við likamsvætur frá smittaðum fólki ella við vakstrarvætu, har nøgdin av virus hevur verið serliga stór.

Eingin tilburður av yrkisfingnum HIV-smittu er skrásettur í Føroyum ella Danmark (1989).

Tað er undrunarvert at ikki fleiri starvsfólk, sum vóru um teir fyrstu AIDS-sjúklingarnir, vórðu HIV-smittað. I byrjanini vistu teir serkønu ikki, at talan var um virussjúku, og tí vóru ongar serligar reglur fyri starvsfólkið.

Kanningar, sum lýsa vandan fyri at verða HIV-smittaður á arbeiðsplássinum, hava somu niðurstøðu - nevniliga, at starvsfólk í ávísum yrkisgreinum kunnu fáa HIV-smittu, men at vandin er ógvuliga lítil.

HIV-smittan hevur kortini so álvarsamar avleiðingar fyri einstaklingin, at slíkur smittuvandi skal beinast burtur í øllum førum.

Av tí at barnakonur ikki eru meira móttakiligar fyri HIV-smittu enn onnur, er ikki neyðugt at gera serligar reglur fyri barnakonur. Tó skal ansast eftir øðrum vandum í arbeiðsumhvørvinum, tá tað snýr seg um barnakonur.

### *4. Stevnumið.*

Tað er vert at strika undir, at tað er neyðugt at handfara serliga blóð men eisini aðrar likamsvætur

og vevnað frá menniskjum, sum møguligir smittuvandar. Hetta er galdandi fyri starvsfólk í heilsu-verkinum, eins og á øðrum arbeiðsplássum, har samband er við blóð og likamsvætur.

Hesar reglur skulu haldast, av tí at tey flestu HIV-smittaðu ikki sjálvi eru greið yvir at tey hava smittuna, og tí blóðroyndir, sum kunnu gerast fyri at finna andevni, bert avdúka smittu, sum er farið fram 1-3 mánaðir áðrenn blóðroynd var tikin.

## *4.1 Øki*.

Hesar reglur eru tí galdandi fyri:

4.1.1 Eitt og hvørt arbeiði, har persónur kemur í samband við blóð, vevnað ella vevnaðarvætu frá menniskjum, uttan mun, um teirra smittustøðu er kend.

4.1.2 Arbeiði, har fólk vanliga ikki koma í samband við blóð v.m., men har hættisligar støður tó kunnu berast á vegna serligt arbeiði ella arbeiðsviðurskifti, t.d. í samband við prik ella skurð ella í samband við fyrstuhjálp.

4.1.3 Arbeiði undir serligum viðurskiftum, har stórar mongdir av AIDS-virus (HIV) er til staðar, sum t.d. á granskingarstovum.

4.1.4 Arbeiði, sum vanliga ikki gevur samband við blóð v.m., men orsakað av arbeiðsslag ella umstøðum har tað verður gjørt, kunnu standast støður við vanda fyri pirk ella skurðvan-lukkur og fyrstuhjálp.

4.1.5 Skipast skal soleiðis fyri, at húð og slímhinnusambandið við blóðvevnað og vevnaðarvætu frá menniskjum verður avmarkað.

## *4.2 Almennar reglur*.

4.2.1 Arbeiðið skal skipast, leggjast til rættis og fremjast á slíkan hátt, at smittuvandin ikki er til staðar ella so lítil sum yvirhøvur gjørligt.

Hetta skal gerast í neyvt samstarv við starvsfólkið og trygdarumboð og skal skipast eftir lokalu viðurskiftunum.

4.2.2 Starvsfólkið skal gerast vart við teir heilsuvandar, sum standast av arbeiðnum, hervið eisini HIV-smittu og tey skulu fáa leiðbeining um arbeiðsgongdina, sum skal haldast.

4.2.3 Ráðgeving skal gevast, sum skal minka um hold- og slímhinnusamband við blóð, vevnað og vevnaðarvætu frá menniskjum.

4.2.4 Har vandi er fyri samband við blóðdálkaðár holnálir, knívar og øðrum hvøssum lutum, skal skipast so fyri, at prik og skerióhapp ikki koma fyri (t.d. við at nýta íløt o.a. sum ikki hol kann koma á, til nálir o.a.)

4.2.5 Teknisk hjálpartól og persónlig verja, sum fyribyrgir slík arbeiðsóhapp, eins og húð- og slímhinnusamband við blóð, vevnað og vevnaðarvætu, skal nýtast. Munnpipettering eigur ikki at nýtast.

4.2.6 Á arbeiðsplássum, har møguleikin at koma í samband við blóð er til staðar, skal hondvask og hóskandi sóttreinskingarevni verða atkomiligt. (sí 3.2.11)

4.2.7 Blóð, vevnaður og likamsvæta frá menniskjum skal beinast burtur í slíkari innballing, at einki verður spilt niður.

4.2.8 Fyrstuhjálpartiltøk skulu leggjast soleiðis til rættis, at til ber at brúka viðgerðarhættir, sum verjir arbeiðsfólkið móti at koma í samband við blóð og annað smittuberandi tilfar. Í fyrstuhjálpskjáttuni skulu vera hóskandi handskar, har møguleikin er til staðar at koma í samband við blóð.

4.2.9 Burturkast, sum inniheldur blóð, lívfrøðiligan vevnað ella vevnaðarvætu frá menniskjum, skal handfarast goymast ella burturbeinast á slíkan hátt, at starvsfólk sleppa undan at fáa húð- ella slímhinnusamband. Hóskandi hjálpiamboð og persónlig verja skal nýtast, tá burturkast skal beinast burtur.
Burturkast skal handfarast eftir galdandi reglum, (sambært galdandi kommunalu reglugerð fyri serligt burturkast).

4.2.10 Um burturkast av misgávum verður spilt niður, skal tað turkast upp beinanvegin og síðandi vaskast við vanligum vaskievni. Er talan um størri mongd, skal eisini turkast upp beinanvegin, men síðan viðgerðast við sóttreinskingaevni (sí 4.2.11).

4.2.11 Vanligu sóttreinskingarevnini og vanligu sóttreinskingarhættir, sum verða nýttir innan heilsuverkið, er nóg mikið til at sóttreinsa tól og aðrar lutir, ið verða dálkaðar av blóði og vevnaðarvætu frá fólki, sum eru HIV-smittað. Hitasóttreinsking hevur fyrimun, har tað er gjørligt. Vanligir kendir hættir verða nýttir.
HIV verður gjørt óvirkið við serligum sóttreinskandi evnum sum t.d. hypoklorit, kloramin, glutaraldehyd og alkoholum. Klorsambindingar og glutaraldehyd eru serliga hóskandi evni til sóttreinsking av amboðum og flatum. Ì heiminum kann nýtast nýgjørdur hypokloritlútur, sum verður gjørdur við at tynna handilsevnið klorin ella líknandi, ið svarar til 4,5 % frítt klor. Við at blanda ein part av klorevni við 9 pørtum av køldum vatni fæst tynningin 1-10. Lúturin skal verða nýttur sama dag.
Alkohol kann nýtast til sóttreinsking av húð- og hondum, eins og til sóttreinsking av reinum flatum. Víst verður til yrkisleiðbeining um sóttreinsking BSR 11, ARáð og leiðbeining um evnafrøðiliga sóttreinsking@, 4. útgáva 1988 um sjúkrahúsreingerð, Statens Seruminstitut 1984.

4.2.12 Vanligt reinføri og skilagóð umferð við skitnum klæðum er umráðandi. Skitin klæði, sum eru blóðdálkað skulu goymast og handfarast soleiðis, at húð- og hold hjá starvsfólki ikki kemur beinleiðis í samband við tey.

4.2.13 *Óhapp/vanlukkur.*
Hond ella annað hold, sum verður dálkað við blóð ella vevnaðarvætu, skal beinanvegin vaskast við vatn og sápu. Slímhinnurnar skulu skolast væl. Rívur í húðini verða smurdar tvær ferðir við jodspiritus 2,5 - 5 % ella hospitalsprit.

Vanlukkur, sum henda á arbeiðsplássinum, skulu fráboðast Arbeiðseftirlitinum eftir van-ligu reglunum.
Er illgruni til smittuvanda, skulu starvsfólk hava í boði at fáa tikna regluliga blóðroynd fyri HIV-andevni, men royndin er sjálvboðin, og møguleiki eigur at verða fyri at verða

ónavngivin.
Óhapp ella tekin um slíkt, har vandi er fyri HIV-smittu eigur í trygdarnevndini at verða kannað og umrøtt, samstundis sum støða eigur at verða tikin til, hví óhapp/støðan kom í, og hvussu slíkar kunnu umgangast í framtíðini.

### *4.3 Serligar reglur*.

Umframt vanligu reglurnar í 3.2, eru eisini serligar reglur galdandi fyri fylgjandi slag av arbeiði:

4.3.1 *Arbeiði í heilsuverkinum.*
Í 1985 sendi danska Heilsustýrið út: ARetningslinjer ved optræden af erhvervet immundefekt syndrom AIDS@, hesi ráð vóru endurskoðað saman við danska arbeiðseftir-litinum í 1988. Arbeiðseftirlitið byggir síni ráð á omanfyrinevndi ráð frá Heilsustýrinum. Serliga verður víst til partin, ið snýr seg om tann arbeiðselvda vandan fyri HIV-smittu og fyribyrging av honum.

Trygdarumboð skal í hesum sambandi virka fyri:
- at avmarka arbeiðsstøður, sum kunnu metast at vera vandamiklar,
- syrgja fyri at reglugerðin verður hildin,
- meta um núgaldandi reglur, og gera nýggjar skipanir, fyri at tryggja starvsfólkið,
- koma við uppskotum um tiltøk til tess at halda reinføri á einum høgum støði, at HIV-smitta ikki kemur fyri.

Tá reinførið er komið á tað ætlaða høga støði, er ikki longur neyðugt við serligum fyri-skipanum um HIV-smittu og heldur ikki fyri serligari merking av smittukeldum.

### *4.3.2 Arbeiði við styrktum HIV.*

Við slíkum arbeiði, sum fer fram á granskingarstovum, er neyðugt við serligum reglum.Ì fyrisit-ingini á hesum øki, nýtir Arbeiðseftirlitið m.a. "Biosafety in Microbiological and Biomedical Laboratories" frá National Institutes of Health (NIH) 1984.

**Arbeiðseftirlitið**, 13. apríl 1989

Eli Davidsen, stjóri (sign.)